# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 17.09.2018 kl. 17.30

Á fundi:
Janus Thomsen
Eir J. Norðberg
Magni Bertholdsen
Gunnhild Mortensen
Sten Spange Larsen
Rúni Thomsen
Poul Laust Christiansen (fyri Niels Olaf Eyvindsson)

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **Umsókn um stuðul til varðveitan av bát.**
   Samtykt varð einmælt ikki at stuðla hesum.

2. **Umsókn um stuðul frá felagnum Víkingaskip.**
   Fyrireikararnir til verkætlanina "Víkingaskipið" hava arbeitt við at savna inn pening og søkja kommunurnar í Suðuroynni um kr. 150.000 í 2018.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at stuðla við kr. 5.000,-.

3. **Reglugerð fyri bingjuplássini hjá Hvalbiar Kommunu.**
   Stytt uppskot til reglugerð fyri bingjuplássini til viðgerðar.
   **Tekniska nevnd:**
   Nevndin hevur ikki viðgjørt málið vegna forfall.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at seta reglugerðina í gildi frá 1. januar 2019.

4. **Skriv viðvíkjandi koyring til eldrafimleik.**
   Eins og undanfarin ár, er ætlanin at hava eldrafimleik sum eitt tilboð undir kvøldskúlaskipanini. Søkt verður í hesum sambandi um koyring til hetta tiltak eina ferð um vikuna.
   **Trivnaðarnevndin 05.09.2018 og Fíggjarnevndin 17.09.2018:**
   Báðar nevndirnar mæla bygdarráðnum til at játta hesum restina av valskeiðinum.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum frá nevndunum..

Eir J. Norðberg luttók ikki í viðgerðini av komandi máli.

5. **Skriv frá borgara í sambandi við arbeiði uttanum hús.**
   Innkomið tilboð uppá stoyping av trappum frá JN-Smíð á kr. 22.400 v/MVG til viðgerðar. Tilboðið er uppá arbeiðsløn, uttan tilfar.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at taka av tilboðnum frá JN-Smíð.

6. **Innkomin tilboð uppá nýggja kopimaskinu til kommunuskrivstovuna.**
   Tríggjar fyritøkur eru bidnar um at koma við tilboðum uppá nýggja kopimaskinu, Nema, Formula og TelduTænastan.
   **Fíggjarnevndin 17.09.2018:**
   Mælt verður til at taka av tilboðnum frá Nema uppá eina Canon iR-C3320i á kr. 30.386 uttan MVG.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt.

7. **Eykarokning fyri asfaltarbeiði við dagstovnin.**
   Samlaða asfaltarbeiðið við dagstovnin var kr. 772.825 v/MVG, av hesum hevur kommunan afturhildið 20% kr. 154.565. Harumframt er eykarokning komin fyri planering v.m. av økinum kr. 74.218,75.
   Kreton hevur boðað frá, at um eyka rokningin verður goldin, verða tey írestandi 20% av tilboðsupphæddini strikað. Hans Haraldsen mælir til at gjalda eyka rokningina, so málið verður endað.
   **Fíggjarnevndin 17.09.2018:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til at fylgja tilmælinum frá Hans Haraldsen.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at gjalda eyka rokningina kr. 74.218,75.

8. **Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 20.15

Janus Thomsen Eir J. Norðberg Magni Bertholdsen

Gunnhild Mortensen Sten Spange Larsen Rúni Thomsen Poul Laust Christiansen